LÝSING AV ÚTBÚGVING
Bachelor of Science (B.Sc.) í búskaparfrøði og virkisfrøði
Bachelor of Science (B.Sc.) in Economics and Business Administration

SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL	Útbúgvingin í búskaparfrøði og virkisfrøði er skipað sum ein bachelor útbúgving, ið telur 180 námsstig (3 lestrarár).
ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR	Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og Samfelagsdeildin.
STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR	Uttanríkis- og Mentamálaráðið (UMMR)
TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL	Galdandi frá august 2020
STIG	'1st Cycle' sambært QF-EHEA og stig 6 sambært EQF-LLL

A	ENDAMÁL
	1) at geva tí lesandi innleiðslu í virkis- og samfelagsbúskaparligu vísindagreinarnar, undir hesum virkisbúskaparlig og samfelagsbúskaparlig ástøði og háttaløg, so tann lesandi fær breiða fakliga vitan og kunnleikar, 2) at geva tí lesandi fakliga vitan, ástøðiligar førleikar og førleikar í vísindaligum háttaløgum, so tann lesandi gerst førur fyri sjálvstøðugt at eyðmerkja, lýsa og loysa torgreiddar samfelags- og virkisbúskaparligar spurningar, 3) at gera tann lesandi føran fyri at virka í privatum og almennum størvum, og 4) at gera tann lesandi skikkaðan til upptøku á framhaldsútbúgvingum, harundir kandidatútbúgving í búskaparfrøði.

B	EYÐKENNI	
1	GREIN(AR) / EVNISØKI	Útbúgvingin er sett saman av trimum høvuðspørtum: 1) Samfelagsbúskaparfrøði (Economics) - millum annað mikro-, makro- og tilfeingisbúskapur. 2) Virkisbúskaparfrøði (Business Administration) – millum annað marknaðarføring, strategi og Corporate Finance. 3) Metodufak – støddfrøði, hagfrøði og økonometri.
2	ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR	Almennur dentur lagdur á at geva tí lesandi fakliga vitan, ástøðiligar førleikar og førleikar í búskaparvísindaligum háttaløgum.
3	KÓS	Akademisk útbúgving í vanligari altjóða viðurkendari búskaparfrøði.
4	SERLIG EYÐKENNI	Áherðsla verður løgd á greining av evnum, ið metast at hava serligan týdning í føroyskum búskaparligum samanhangi, til dømis umsiting av náttúrutilfeingi og vinnupolitikki í einum mikrobúskapi.

C	STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING	
1	STARVSMØGULEIKAR	Bachelorútbúgvingin í búskaparfrøði ger tann lesandi skikkaðan til sjálvstøðugt at røkja størv, ið krevja hollar virkis- og samfelagsbúskaparligar kunnleikar og førleikar. Tann lesandi kann tí við eini bachelorútbúgving søkja størv í privata vinnulívinum og

		innan almenna geiran - t.d. í almennu umsitingini og fyrisitingini, peningastovnum og fyritøkum.
2	FRAMHALDSÚTBÚGVING	B.Sc. prógvið gevur møguleika til framhaldslestur á masterstigi (2nd Cycle) á hægri lærustovnum.

D	ÚTBÚGVINGARHÁTTUR	
1	ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING	Fyrilestrar, floksundirvísing, einstaklingauppgávur, einstaklingaframløgur, bólkaarbeiði, bólkaframløgur, verkstovur og venjingar.
2	PRÓVTØKUHÆTTIR	Munnlig ella skrivlig prótøka krevst í øllum skeiðum. Prótøkan kann í nøkrum skeiðum skipast sum innlating av skrivligari uppgávu.

E	ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR
1	ALMENNIR FØRLEIKAR
	Akademiskt arbeiðslag: megna at arbeiða kannandi og fyrihalda seg kritiskt og greinandi til spurdómar og keldur, og at orða, lýsa, greina og tulka fakligar spurdómar og seta fram væl grundaðar niðurstøður og perspektivering. **Samskiftisførleikar**: megna at samskifta og samstarva tilvitað og á skynsaman hátt í ymsum støðum við onnur. **Sjálvstøðugt arbeiðslag:** duga at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í toymum, at loysa ítøkiligar uppgávur sjálvstøðugt og í bólki. **Trupulleikaloysn**: megna at staðfesta og loysa trupulleikar og taka avgerðir. **Vitan í praksis**: duga at inna vitan í verki. **Menning**: megna at menna og dagføra egna læring.
2	FAKLIGIR FØRLEIKAR
	Fakligt yrkisgrundarlag: megna at skilja týdningarmestu ástøðini og hugtøkini innan lærugreinarnar roknskapur, fyriskipan (organisation), fígging (finansiering), strategi, marknaðarføring, mikroøkonomi og makroøkonomi, og brúka háttaløgini hjá hesum lærugreinum. **Praktiskt yrkisgrundarlag**: duga at eyðmerkja samfelags- og virkisbúskaparligar spurdómar og at skilmarka samfelags- og virkisbúskaparligar spurdómar sum fortreyt fyri at seta fram uppskot til loysnir. **Førleiki at samskifta**: duga at miðla greiningar og greiningarúrslit til týðandi málbólkar.

F	FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI
	Eftir lokna útbúgving skal tann lesandi vera førur fyri at: • meta um egnan yrkissamleika, tá ið hugsað verður um hugburð, arbeiðshættir og avrik. • greiða frá búskaparfrøðiligum ástøði. • greina og meta um búskaparfrøðilig ástøði og arbeiðshættir. • meta um viðkomandi faklig háttaløg og kunnleika. • brúka vitan um týðandi búskaparfrøðilig ástøði í egnum arbeiði. • brúka kvantitativ og kvalitativ háttaløg til viðgerð av búskapar- og virkisavbjóðingum/møguleikum. • draga fram viðkomandi og grundaðar niðurstøður og perspektiveringar úr búskaparfrøðiligum tilfari. • skipa, diskutera og miðla vitan um búskaparfrøðilig viðurskifti. • skilja og lýsa týdningin av sentralum organisatións- og marknaðarhugtøkum, sum gera seg galdandi fyri eina organisatión. • greina og meta um viðkomandi virkisfrøðilig ástøði, hugtøk og myndlar, sum viðgera og framleiða vitan um konkretar trupulleikar. • greina konkretar virkisfrøðiligar trupulleikar og framleiða viðkomandi loysnir.

	• miðla granskingarúrslit á einum vísindaligum støði, bæði á skrift og í talu. • grundgeva sjálvstøðugt og nágreiniliga fyri einum trupulleika og trupulleikaorðing. • meta um og velja viðkomandi ástøði og háttaløg í mun til útvald trupulleikaøki. • grundgeva fyri vali av ástøði og háttalagi í eini verkætlan. • skipa egið arbeiði og tess úrslit í eini samanhangandi og væl skipaðari verkætlanarfrágreiðing. • seta fram eina greiða ætlan fyri skipan og gjøgnumføring av verkætlan.